# Læknar fáa 56.000 krónur um vikuna

**Tá læknar stilla til forvakt á Suðuroyar- ella Klaksvíkar sjúkrahúsi, fáa teir heilar 56.000 krónur í løn um vikuna. Tað váttar Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum**



*Aksel V. Johannesen ætlar sær at taka stig til, at høgu lønirnar til læknarnar á forvaktini verða lækkaðar í næsta sáttmálaskeiði*

Leo Poulsen

Tá Jenis av Rana mikudagin setti Aksel V. Johannesen, landsstýrismanni í heilsumálum, fyrispurning um lønina hjá læknum av Landssjúkrahúsinum, sum høvdu tilkallivaktir á Suðuroyar- og Klaksvíkar sjúkrahúsum, váttar landsstýrismaðurin, at læknarnir eru sera væl løntir.

– Tað er rætt, sum Jenis av Rana førir fram, at hesir læknarnir fáa 56.000 krónur í løn um vikuna. Men hartil er at siga, at teir hava tilkallivakt 24 tímar um samdøgrið sjey dagar í vikuni, sigur Aksel V. Johannesen.

Sáttmáli er gjørdur millum serlæknafelagið og felagnum fyri yngru læknar øðrumegin og Fíggjarmálaráðið hinumegin, og tann sáttmálin má fylgjast.

– Sjálvur haldi eg, at lønin er alt ov høg, men talan er um ein gamlan sáttmála, sum vit mugu fylgja, sigur Aksel V. Johannesen.

Men tá talan er um eina 24 tíma vakt í sjey dagar, kunnu fólk so kenna seg trygg við tað.

– Talan er um eina forvakt á Suðuroyar Sjúkrahúsi, og tað er ikki altíð, at tað er so nógv at gera, og teir hava eitt kamar á sjúkrahúsinum, so teir sova eisini inn ímillum, sigur Aksel V. Johannesen.

## Vil broyta sáttmálan

Læknarnir fáa hesa sera stóru løn, samstundis sum tað kemur fram, at Landssjúkrahúsið ikki hevur nóg stóra játtan at nøkta heilivág til sjúklingarnar. Eisini koma hesar høgu lønir fram um somu tíð, sum fokus verður sett á ferðaendurgjaldið til tingfólk sammett við tað, ið vanligi borgarin fær í ferðaendurgjaldi.

– Sum nevnt er talan um ein gamlan sáttmála. At lønin er ov høg eri eg samdur við Jenisi av Rana í, men skal hendan lønin broytast, má tað greast umvegis sáttmálan, og hann er sum nevnt í gildi enn, sigur Aksel V. Johannesen.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann er ikki partur av hesum sáttmálanum, sum verður umsitin av fíggjarmálaráðnum.

- Nú eri eg ikki greiður yvir, nær sáttmálin gongur út, men so leingi hann er galdandi, mugu vit halda hann. Hinvegin haldi eg, at tá nýggjar samráðingar verða tiknar upp, eiga vit at hyggja nærri eftir hesum, sigur Aksel V. Johannesen.

Landsstýrismaðurin heldur, at lønirnar eru alt ov høgar, og hann ætlar sær eisini sum nevnt at fáa gjørt okkurt við hetta.

– Tá samráðingarnar verða aftur ætli eg mær avgjørt at mæla til, at teir læknarnir, sum eru á forvaktini, fáa lægri løn enn teir fáa í dag, sigur Aksel V. Johannesen.

*leo@sosialurin.fo*

# Ósemja um sparingar

**Í Tinginum mikudagin boðaði John Johannesen frá, at hann ætlaði sær at reisa spurningin um ferðasamsýningar til tinglimir. Kári P. Højgaard setti tó sum treyt at taka undir við slíkum uppskoti, at javnaðarmaðurin atkvøddi fyri einum 5% niðurskurði í tingfólkalønum**

Leo Poulsen

Tað hevur elvt til mikið kjak millum manna, at Sosialurin mánadagin vísti á mismunin millum ferðaendurgjald til tinglimir og vanlig arbeiðsfólk.

Bæði løgmaður, Kaj Leo Johannesen, og John Johannesen, politiskur formaður hjá Javnaðarflokkinum á Tingi, høvdu viðmerkingar á Rás2 til málið, og tað er líkt til, at báðir fara at taka stig til at gera nakað við ferðaendurgjaldið, hvør á sínum øki.

Løgmaður segði við Rás2 í gjár, at eitt hitt fyrsta hann tók stig til eftir at verða blivin løgmaður, var at seta ein areiðsbólk at endurskoða samsýningar til tingfólk. Hetta álit hevur løgmaður fingið í summar, og farið verður nú undir at greina, hvat arbeiðsbólkurin er komin fram til.

– Fyrst og fremst skal fáast størri gjøgnumskygni í samsýningarnar. Greinast skal, hvat er koyripeningur, hvat er samskiftisendurgjald og so víðari, sigur løgmaður.

Hetta er nakað, sum verður tikið upp í nærmastu framtíð, men løgmaður ávarar ímóti bara at hyggja at tølunum uttan at sundurgreina, hvat endurgjaldið er fyri.

– Tað er eyðvitað, at um tinglimir hava tveir til tríggjar tímar at koma á tingfund, so eiga teir sjálvandi at fáa endurgjald fyri tað, sigur Kaj Leo Johannesen.

## Løn ella samsýning

John Johannesen helt eisini, at tað líkist ongum, at so stórur munur er á ferðaendurgjaldi hjá tingfólki og vanligum fólki. Tí ætlar hann sær at leggja uppskot fyri Tingið um at skarva av koyripengunum. Hetta tekur Kári P. Højgaard tó ikki treytaleyst undir við.

Vit skulu minnast til, at tingfólk fáa sama ferðaendurgjald sum tænastumenn landsins. Vit fáa fyri hundrað dagar um árið, men eg sigi fyri meg, at eg eri í Havn minst tvífalt so ofta, ikki bara til tingfundir, men eisini til nevndarfundir og aðra umboðan hjá Løgtinginum, sigur Kári P. Højgaard.

Hann kallar eisini fráboðanina hjá John Johannesen um eitt løgtingsuppskot til at skarva av ferðaendurgjaldinum fyri populistiskt.

– Tað kostar ikki John Johannesen eitt oyra at seta eitt slíkt uppskot fram, tí tað eru bert tinglimir uttan fyri Miðstaðarøkið, sum í orðsins týdningi kunnu fáa koyripening, sigur Kári P. Højgaard.

*leo@sosialurin.fo*



*Kári P. Højgaard tekur ikki undir við at lække ferðaendurgjaldið til tingfólk so sum John Johannesen mælir til, men vil heldur skava av lønunum*